## FCK úti úr dreymalandi

Apoel Nicosia, sum í summar sendi EB/Streym úr Europa-Cup, gjørdi í gjárkvøldið tað sama við donsku meistararnar úr FCK. FCK hevði annars eina 1-0 leiðslu við sær frá fyrra dystinum í Parkini, men í hitanum á Cypros gekk heilt galið hjá FCK. Fyri steðgin sótu vertirnir á øllum, og samlaði sigurin lá í luftini, tá tað í steðginum stóð 3-1 á máltalvuni. Eftir steðgin reistist FCK, og í longum løtum vórðu vertirnir trýstir í botn. Men lívgevandi málið kom ongantíð, og so má FCK staðfesta, at europisku milliónirnar ikki vera til nakað í hesum umfarinum.




## Lutakast í dag

Seinastu dystirnir í Champions League undankappingini vórðu spældir í gjárkvøldið. Umframt sigurin hjá Apoel Nicosia, vóru úrslitini hesi. Í klombrum er viðmerkt samlaða úrslitið. Arsenal-Celtic 3-1 (5-1), Stuttgart-Poltehnica Timisoara 0-0 (2-0), Fiorentina-Sporting 1-1 (3-3) og Olympiakos-Sheriff Tiraspol 1-0 (3-0). Seinnapartin í dag verður lutakast um, hvussu spælast skal í bólkaspælinum.

# Gekk sum væntað

**Enn eina ferð vunnu favorittarnir, men merkisvert var, at AB-kvinnurnar vóru hepnar, at tær fingu sigurin á Skála, umframt at KÍ kom seint í gongd ímóti EB/Streymi**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Nøkur av umførunum í 1. deild hjá kvinnum eru soleiðis háttað, at tá spæla tey betru liðunum ímóti teimum verru, og tá er sum oftast so mikið stórur munur á, at úrslitini næstan geva seg sjálv. Men í gjárkvøldið kundi saktans verið øðrvísi, um Skála hevði hepni við sær, tá AB var á vitjan.

Allan fyrra hálvleik vóru skálakvinnur so sannførandi, at tær høvdu einki málspark og AB einki hornaspark, men hóast fleiri kjansir – harav einar tveir sera stórar – eydnaðist ikki at fáa nakað burtur úr yvirvágini.

Í staðin gjørdist tað AB, ið fór avstað við øllum, tá liðið í seinna hálvleiki vísti effektivitetin, ið ofta kemur fremru liðunum til góðar. Tó kom ikki hol á, fyrr enn eitt korter var eftir, og fimm minuttir fyri tíð fekk AB pyntað um úrslitið, so tað gjørdist ein 2-0 útisigur á Skála.

### KÍ seint í gongd

Við Margáir var dysturin hálvan tíma seinkaður, tí eingin dómari var. Sostatt noyddust dómarar og hjálpardómarar at døma, so KÍ-kvinnurnar ikki skuldu vera komnar úr Klaksvík til fánýtis. Setti dómarin hevði givið avboð, var sagt, men FSF-umsitingin hevði ikki avgreitt málið víðari.

Tað gekk annars ikki eftir vild hjá KÍ í fyrra hálvleiki, tá EB/Streymur vardi væl og enntá kundi fingið fyrsta málið, tá bólturin endaði á yvirliggjaranum. Men stutt undan steðginum kom KÍ framum, og í seinna hálvleiki var eingin ivi, tá fýra mál komu aftrat, so KÍ vann sannførandi 5-0.

Í Sarpugerði tók Víkingur ímóti B68/NSÍ, sum eftir skránni skuldi havt heimavøll, men hevði mist hann, tí liðið ikki møtti til dyst ímóti Víkingi herfyri. Her var eingin slingur í valsinum hjá Víkingi, sum kom á odda tíðliga og síðani trygt koyrdi ein 4-0 sigur heim. Tó vóru fleiri brendir kjansir, so sigurin kundi lættliga verið størri.



Malena Josephsen og hinar í KÍ komu í gjárkvøldið seint í gongd ímóti EB/Streymi – bæði so og so…
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Støðan, 1. deild kvinnur

| Nr | Lið | Dystir | V | J | T | Mál | +/÷ | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 16 | 13 | 2 | 1 | 75- 6 | 72 | 41 |
| 2 | AB | 16 | 13 | 2 | 1 | 41- 6 | 35 | 41 |
| 3 | Víkingur | 16 | 9 | 3 | 3 | 35-19 | 16 | 30 |
| 4 | Skála | 16 | 5 | 1 | 4 | 19-43 | ÷24 | 16 |
| 5 | EB/Streymur | 16 | 2 | 1 | 13 | 8-56 | ÷48 | 7 |
| 6 | B68/NSÍ | 16 | 1 | 1 | 14 | 5-56 | ÷51 | 4 |

**EB/Streymur-KÍ 0-5 (0-1)**
**0-1:** Sofía Purkhús
**0-2:** Rannvá Andreasen
**0-3:** Sofía Purkhús
**0-4:** Ása K. Thomsen
**0-5:** Ása K. Thomsen

**Skála-AB 0-2 (0-0)**
**0-1:** Olga Kristina Hansen
**0-2:** Rannvá Poulsen

**Víkingur-B68/NSÍ 4-0 (2-0)**
**1-0:** Heidi Sevdal
**2-0:** Kristbjørg Isaksen
**3-0:** Hanna Isaksen
**4-0:** Mariann Isaksen